# evnd barnavíkin



*Væl av fólki høvdu leitað sær oman á Støðna til hugnaliga tiltakið, sum eisini eydnaðist serstakliga væl. Staðið var eisini væl valt, vóru fólk samd um – ikki minst til vakra sangin frá Susanne og Rúna Brattaberg*

ina hjá Nancy um feigdardagin, tollaksmessudag, 1913, táið nógvar bygdir í Føroyum mistu bátar og menn....(vit hoyrdu 1. og annað ørindi í áðni)

3.ørindi:
*Komnir á miðið teir fóru til verka,*
*línurnar settu so skjótt eftir hógv;*
*aftaná løgdu teir nakað til merkis,*
*fjart har í havsbrúnni sorti upp dró.*

4. *Skjótt hann seg breiddi og so kom eitt vindblak,*
*var best í stundini heim seta kós?*
*Veðrið skjótt øtlar — teir línuna draga*
*kraftmiklar hendur nú rívast til blóðs.*

5. *Skjótt bar hann* at,*
*tann, ið har var á odda,*
*ein**, sum var við hesum, taldi mær frá*
*blaðungur tá, tó enn greinliga minnist*
*bragdið, bátsfelagan fremja hann sá.*

6. *Línan úr havi ei drigin, men rivin,*
*flotini ikki teir bjargaðu tá,*
*í borðinum búgfult av onglum stóðu,*
*teymar hann sleit, tá ið hart leikti á.*

*Sofus Højgaard, sonur Jóhan Kristian Højgaard á Tippinum.*
**Dánjal Pauli ("Palli") Højgaard, sonur Per Højgaard, ið eisini var við henda túrin.

....

Vit skilja, at hesin túrurin, ið Nancy yrkir um, hevur verið ein línu-túrur. Annars er mær sagt, at rituvíkingar mest hildu seg til snørið; tí tá var skjótari at rýma, um veðrið øtlaði....

Her hava verið mangar vandaferðir. Her hevur mangan verið nær við, at bátar ella manningar fóru. — Men hvørja ferð, bóru allir menn boð í bý! — Jú, sanniliga er hendan bygdin sloppin væl við at vera ein útróðrarbygd.

So vítt eg havi skilt, er ongin maður enn farin á útróðri — men fleiri eru farnir á skipi og í øðrum vanlukkum.

### Royndu ítarstu megi

Hvussu gekst so við túrinum tollaksmessudag í 1913? Vit lata Nancy Vesturbú, fødd Højgaard, fáa orðið aftur:

7. *Royndu teir har sína ítarstu megi,*
*alsamt at oysa tað kravdi sín mann,*
*hildið varð á — kámt sást lýsa fyri degi,*
*fámælt var orðað og sjórok um stavn.*

8. *Veiðan er bjargað, og uttan av havi*
*aftur mót landi leiðin nú lá,*
*ilskan í sjónum og brotið frá bárum,*
*undur teir spurdust í aftur tá.*

9. *Ódnin var mikil, ei mundi avhæsa;*
*tá sást eit óløg´ ið alt kundi knasa,*
*reisa seg upp sum ein hóttandi múrur*
*endin er komin, hvør maður stúrir.*

10. *Á teimum øllum nógv mundi standa,*
*skuldu teir ongantíð vinna til landa?*
*Men tá ið skaðasjógvur skal bróta,*
*Tann elsti*** á bátinum royndi sær fóta.*

11. *Upp brá sín arm, hin almáttuga nevndi*
*- nakað var hent, hvør ein á sær nú kendi. —*
*Brotið hitt mikla, ið alt kundi knasa,*
*slætnaði niður uttan at hvæsa.*

12. *Seinni, tá ið teir nærkaðust støðni,*
*fólkið alt samlað var niðri á lónni,*
*loftaðu bátinum alt sum í einum*
*garður av monnum á sjóbardum steinum.*

13. *Maður, sum slíka lívsroynd kann gera,*
*av henni støðugt merktur man vera;*
*stríðið og bjarging mót hóttandi bárum*
*lýsir sum viti á aldrandi árum.*

Hesin var "Gamli-Dánjal Petur", elsti bróðir Per Højgaard. Hinir tríggir, ið við vóru hendan minniliga túrin vóru: Hanus og Dánjal Petur, báðir synir til Per (ið sostatt hevði tríggjar synir við sær, umframt ein bróðir og ein bróðirson)

Í 1913 eru gingin 40 ár síðan, at fyrstu fólkini búsettust í Rituvík (fyrstu hjúnini vóru Per og Nicolina, fødd Thorkildshøj).

### Í grind

Hetta var so yrkingin hjá Nancy eftir frásøgn frá pápa hennara, Dánjal Paula ella Palla hjá Peri. — Eg havi hoyrt Palla, abbabeiggja, fortalt um hesa hending — og eisini hoyrt aðrar siga frá hesi undurfullu bjarging.

Á hesum stað — her á Støðni - kundi verið so nógv annað at sagt frá. - Frá grindaferðum, norðhavsútróðrarferðum, frá truplari lending undan óløgum.... osfr.

Eg skuldi havt enda her, men eftirsum vit hava Meinhard Bjartalíð, prest, hjá okkum her sum dirigent fyri kórinum, so takið eg hetta lítla brotið við aftrat. Tað er úr bókini hjá skyldmannai hansara, John Reid Bjartalíð: "**Á Gomlum Gøtum og Yngri**", frá 1991 og frásøgnin er "Ein fongríkur dagur", (s.. 189-190)... Tað er Lamba-Kristian, ið sigur frá um eina grinda-ferð hjá Kinnamonnum í Lamba, hin 8. august, 1909. Hanus og synirnir Kinna-Jákup og Kristian hava verið til útróðrar og hava funnið eina grind, sum teir royna at reka suður eftir við Suðurrákinum.

Lamba-Kristian sigur soleiðis, eftir at teir hava havt hava upp mastur og striltið gongur at fáa aðrar bátar at koma til hjálpar:

...Nú hildu vit okkum síggja, at menn runnu í Rituvík, og tað varð skjótt, at væl mannaður bátur kom út hiðani. Fyrsta, teir koma til grindina, sigur pápi: "Okkum hevur longst eftir tykkum."

Teir svaraðu aftur: "Tað gekk so striltið at fáa bátin fullmannaðan, tað nógva av mannvaksna er burturi, og summir av heimamonnunum vóru frá húsum, fingust við torvlutir og tílíkt."

"Hatta er tann flokkurin, ið er, systkinabarnið!" helt Per fyri; teir vóru dupult systkinabørn, pápi og hann. Pápi segði við rituvíkingar: "Vit eru longu so móðir, kanska vit høvdu fingið ein mann frá tykkum at róð við okkum". Tað var gaman í beinanvegin. Jóhan Kristian á Tippinum kom okkum til hjálpar. Hann var eisini raskur at rógva. Pápi og hann sótu á aftasta bekki.... Báðir bátarnir fara við grindini suðureftir. At enda verður hendan grindin goymd í Kaldbak um kvøldið og um náttina .Hon doyr norðuri í Sundum, við Boshøvdavíkina dagin eftir. Eini tvey samdøgur seinni koma bátarnir søkkladnir rógvandi aftur við grind..... "soleiðis knógvaðu teir gomlu" (sum John Reid Bjartalíð tekur til...)

So skal eg verða liðugur - nú kaffið er klárt og maturin er tilreiðar á grillunum...

### Orsøk til stoltleika

Men, mín niðurstøða er so tann, at rituvíkingar kunnu verað stoltir av sínari útróðrarsøgu — sjálvt um tað kanska í nútíðini er nakað í millum at bátur verður flotaður. - Hvør veit, kanska fara vit at rógva út á annan hátt her á staðnum í framtíðini! — Kanska hendan fyrsta FJØRUKONSERTIN fer at vaksa til ein FJØRU-FESTIVAL. Lat okkum heldur nýta eitt frægari føroyskt orð sum FJØRU-FAGNAÐUR! Kanska bæði her á Støðni og úti á Kráargili? Møguleikarnir eru her. Staðið her er sermerkt, gevur serstakan stemning — her vit hoyra "havsins andradrátt", sum tað verður tikið til.

Takk fyri, at tit lýddu á — og havið eitt framhaldandi gott kvøld við felagssangi, kórsangi, solosangi, steiktum góðbitum, gongutúri, søgum o.ø. góðum!

(NB: beinleiðis sitat eru endurgivin eftir avtalu við rithøvunda ella rættindishavara)

# Væleydnað mentanartiltak á støðni í Rituvík



*Susanne og Rúni Brattaberg settu sín serliga dám á tiltakið í Rituvík*

**Hæddarpunktið á mentanartiltakinum var konsertin við Susanne og Rúna Brattaberg. Tey fingu berg og fjøru á støðni at ristast við magnfullum og yndisligum klassiskum sangi, har skráin umfataði ariur og operettur**

MENTANARTILTAK
*Orð/myndir: Tóki Højgaard*

Tey stívliga 300 fólkini, sum høvdu leitað sær oman á Støðna seinasta leygarkvøld, vóru væl fyri at taka ímóti forkunnugu vitjanini frá týsku operuni.

Áðrenn Susanne og Rúni sungu, var Kór Glyvra Kirkju við Meinhard Bjartalíð á odda á skránni. Tey opnaðu oyru og sinni okkara við góðum føroyskum summarog fosturlandssangum. Somuleiðis bygdi Sverri Justinussen upp ein góðan stemning við mergjaðum felagssangi. Eisini var røða á skránni við Dánjal Petur Højgaard.

Hann greiddi frá útróðri og lendingum í Rituvík og lýsti á henda hátt "kulissurnar" fyri konsertini.

Eitt virðiligt innslag á mentanarkvøldinum var, at nýliga heimkomnu lokalu ítróttarfólkini frá Oyggjaleikunum vórðu heiðrað við blómum, gávum og hurrá-rópum. Talan var um fimleikarar, svimjarar og fótbóltsleikara.

### Eftir bygdargøtuni

Leygarkvøldið, 16. juli kemur at standa fast í minninum hjá nógvum av teim luttakandi. Tí umleið 100 fólk gjørdu av at luttaka á gongutúrinum eftir gomlu bygdargøtuni millum Rituvík og Lamba.

Leiðin gekk framvið gróthúsum, har søgur vórðu sagdar av Óla Simonsen. Tá ið Lamba bygd kom undan, segði Óli frá "Norsku Løvu", ið strandaði í Lamba nýggjársdag í 1707.

Tikið varð saman um og nøkur ørindi úr vísuni vórðu kvøðin. "Stolt Signhild" gav eisini týsku operagestunum — sum øll fýra gingu við okkum — ein varhuga av, at føroyski dansurin enn er livandi í Suður-Eysturoy! Gingið var oman til Lamba Skúla, har blíðir kokkar stóðu klárir við súpan, kaffi og køkum.

Tiltakið endaði um miðnáttarleitið við, at øll so við og við fluttu seg til húsa heim, mett til likams og sálar av einum sera væleydnaðum mentanartiltaki.

Kunningarstovan v/ Rannvu Troest og Runavíkar Kommuna eiga stórt rós uppiborið fyri enn eitt væl fyriskipað tiltak!